

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 11 - 2011

# Tórsborg  fjórða frálandaskipið hjá Supply Service

Fyrst kom Eldborg, síðani Saeborg og Sjóborg er ávegis. Nú kemur so eisini 4. skipið hjá Supply Service, Tórsborg. Menning Føroyska frálandavinnan er í stórari menning. Tað er bert góður mánaði síðani, at enn eitt frálandaskip kom í føroyska flotan. Og longu nú ganga aftur tíðindi um, at annað av føroysku frálandareiðaríunum, Supply Service í Leirvík er um at gera avtalu um enn eitt skip. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Supply Service váttar fyri oljan.fo, at arbeitt verður við at fáa bygt enn eitt frálandaskip á Havyard skipasmiðjuni í Noregi. Frammanundan hevur reiðaríið tvey frálandaskip og tað triðja er í gerð. Hann leggur tó dent á, at enn restar nakað í, til alt er fyri fingið uppá pláss. Og einki er liðugt fyrr enn alt er liðugt. Treyðugt so  so skilja vit, at talan er bert um ávís fyrivarni. 1,2 milliard Talan er sostætt um tað fjórða skipið av hesum slag, sum føroyska reiðaríið letur byggja í Noregi. Fyrst kom Eldborg, síðani Saeborg og í løtuni verður triðja skipið, Sjóborg gjørt liðugt í Noregi. Skrokkurin til 4. og nýggjasta skipið verður bygdur í Turkalandi í løtuni. Skipið fer at eita Tórsborg og verður latið eigaranum í juli næsta ár. Tað kostar 300 mill. kr. Tilsamans er talan um eina samlaða íløgu uppá 1,2 milliardir krónur i tey fýra skipini, sum geva arbeiði til 100 føroyingar. (Lesið eisini samrøðu seinni við Jens Meinhard Rasmussen um vaksandi virksemið hjá føroyska frálandareiðaríinum.